ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1 – 3
100 Tórshavn

20. september 2023
Mál: 23/18223-5
Tygara skriv:
Viðgjørt: HP

Nr. 52-023/2023

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-023/2023 eftir tingskipanini §52a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu, um hjálparíkoyti og hækkað familjuíkoyti í 2023

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

Spurningar:

1. Hvussu nógv húski hava fingið hjálparíkoyti sambært løgtingslóg um familjuíkoyti?
2. Hvussu nógv av hesum eru húski við einum vaksnum og hvussu nógv húski hava fleiri vaksin?
3. Hvussu nógv húski hava fingið oljuíkoyti sambært løgtingslóg um familjuíkoyti?
4. Hvussu nógv húski fáa ágóðan av, at familjuíkoytið er hækkað í løtuni?

Svar:

1. *Hvussu nógv húski hava fingið hjálparíkoyti sambært løgtingslóg um familjuíkoyti?*
   Tað eru 668 húski, ið higartil hava móttikið hjálparíkoyti, sambært løgtingslóg um familjuíkoyti. Harumframt eru umleið 10 umsóknir, sum ikki eru liðugt viðgjørdar.

2. *Hvussu nógv av hesum eru húski við einum vaksnum og hvussu nógv húski hava fleiri vaksin?*
   Fyri at svara spurninginum er neyðugt at fáa uttanhýsis kt-veitaran hjá Almannaverkinum at gera nakrar broytingar ella at kanna málini manuelt. Hetta hevur ikki eydnast áðrenn freistina.

3. *Hvussu nógv húski hava fingið oljuíkoyti sambært løgtingslóg um familjuíkoyti?*
   Tað eru 415 húski, ið hava móttikið oljuíkoyti, sambært løgtingslóg um familjuíkoyti.

4. *Hvussu nógv húski fáa ágóðan av, at familjuíkoytið er hækkað í løtuni?*
   Í mun til oljuíkoyti og hjálparíkoyti, so er rætturin til familjuíkoyti ikki knýttur at húskishugtakinum. Ein stakur uppihaldari, sum t.d. býr hjá egnum foreldrum, ella ein stakur uppihaldari, sum eisini hevur vaksin heimabúgvandi børn, er í sambandi við rættin til familjuíkoyti at rokna sum stakur. Hinvegin hevur parlagsstøða týdning fyri, hvussu familjuíkoytið verður roknað.

Broytingin í løgtingslógini um familjuískoyti hevur við sær, at veitingin hjá øllum móttakarum hækkar, og harvið fáa øll, sum eru í skipanini ágóðan av hækkingini. Talið av móttakarum broytist eitt sindur frá mánað til mánað. Síðani broytingin kom í gildi hava 316 familjur móttikið familjuískoyti og hava harvið fingið ágóða av hækkingini. Av teimum 316 eru 268 støk og 48 samlivandi pør.

Tórshavn, 20. september 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna